# The Bone Collector

**Á TV3 sunnukvøldið kl. 20.00**

Amerikanskur thrillari frá 1999 við: Denzel Washington (Lincoln Rhyme), Angelina Jolie (Amelia Donaghy), Queen Latifah (Thelma), Michael Rooker (Captain Howard Cheney), Mike McGlone (Detective Kenny Solomon), Luis Guzmán (Eddie Ortiz)



*Avlamni kriminalgranskarin Lincoln Rhyme og løgreglukvinnan Amelia Donaghy stríðast ímóti tíðini, meðan tey royna at fanga ein ræðuligan hópdrápsmann*



*Ræðandi spenningsfilmurin frá 1999 The Bone Collector*

Ein ræðuligur raðdrápsmaður gongur berserkaragongd í Manhattan - hann er júst byrjaður. Borgararnir í Manhattan hava ikki sæð nakað líknandi fyrr. Fjáltur er á fólki og øll eru skelkaði. Klóki drápsmaðurin fer illa við ofrum sínum og letur eftir sær kotaði boð á gerningsstaðnum. Tað er bara ein maður, ið er førur fyri at týða tey gátuføru boðini, sum drápsmaðurin letur eftir sær. Hesin er tann kendi kriminalgranskarin Lincoln Rhyme (Denzel Washington). Hann er tó ikki sjálvur førur fyri at fanga drápsmannin, tí eftir eina arbeiðsvanlukku bleiv hann ógvusliga rørlsutarnaður. Hann kann bert nýta ta einu hond sína at arbeiða við. Hann hevur sostatt brúk fyri einum álítandi hjálparfólki og hetta finnur hann í Amelia Donaghy (Angelina Jolie), ið er ein skilagóður løgreglumaður. Men tað er bara ein spurningur um tíð, áðrenn drápsmaðurin aftur ger um seg. Munnu tey fara megna at forða honum í hesum?

# Familjuterapi

**Á Kanal 5 mikukvøldið kl. 20.00**

**Upprunaheiti: Analyse This**
Amerikanskur skemtifilmur við: Paul Vitti (Robert De Niro), Dr. Sobol (Billy Crystal), Laura MacNamara Sobol (Lisa Kudrow), Primo Sidone (Chazz Palminteri), Jelly (Joe Viterelli), Caroline (Molly Shann-on)



*Mafiosurin Vitti (Robert DeNiro) krevur at fáa hjálp frá sálarlæknanum Dr. Sobol (Billy Crystal) í hesum skemtifilminum á Tv3 mikukvøldið*



*Lívið hjá Dr. Sobol (Billy Crystal) og Laura MacNamara (Lisa Kudrow) verður órógvað av einum máttmiklum mafiosi, ið stríðist við angistnevrosu*

Máttmikli mafiabossurin Paul Vitti er úti fyri eini morðroynd. Eftir hendan tilburðin missir mafiosurin Vitti so líðandi tamarhaldið á sínum annars so sterka sinni, og fær ofta angistherðindi. Hetta er sjálvsagt sera pínligt fyri ein slíkan mann sum Vitti. Men eitt minni bilóhapp setir hann í samband við sálarlæknan Ben Sobol, sum fær eitt tilboð, ið hann ikki kann takka nei til. Vitti ynskir at koma í viðgerð fyri sína angistnevrosu. Dr. Sobol játtar og viðgerðin byrjar. Men skjótt troyttast Sobol av mafiosinum, ið nátt og dag vil tosa við seg. Sjálvt á brúdleypsdegnum hjá Sobol og komandi konu hansara, Laura MacNamara, órógvar mafiosurin. Um somu tíð, sum alt hetta fer fram, tekur stórt stríð seg upp í brotsmannaheiminum - arbeiðsplássinum hjá Vitti. Nú kemur FBI uppí leikin og Sobol fær nú ta fatanina, at Vitti ætlar at drepa seg. Og hetta hevur við sær næstan lívshættisligar misskiljingar.





## FILMSTEIGURIN

# Tey ótrúligu

Harra og frú Parr liva eitt heilt vanligt lív saman við børnum sínum, Violet, Dash og lítla Jack.

Hvønn dag fer Bob Parr við bili til arbeiðis á tryggingarfelagnum, har hann metir um krøvini hjá kundum sínum, meðan Helen ansar heiminum. Í øllum førum skuldi eingin hildið, at tey bæði eisini eru superhetjurnar, Ótrúligi og Elestigentan.

Stjórnin hevur sent báðar hetjurnar á penión, men at kalla síðani hava tey tó roynt at fáa Bob aftur í gamla starvið, men hann noktar fyri hesum. Brádliga fær hann tó møguleikan at taka lut í einum sera lønandi arbeiði, og tá fær hann ikki sagt nei. Kanska átti hann tó at sagt Helen frá hesum, tí arbeiðið er kanska ikki heilt soleiðis, sum Bob hevði roknað við.





# Sky Captain and the World og Tomorrow

Navnði er Sky Captain! Himnanna ókrýndi kongur, sum nú skal royna at bjarga menniskjuni.

Svakið granskarin, Dr. Totenkopf og ætlanir hansara hóatta alla mannaættina. Við hjálp frá tíðindakvinnuni, Polly Perkins og trúfasta Warhawk noyðist hetja okkara nú at stríðast í luftini, á vatninum og í eldi, til tess at bjarga okkum.

Talan er um eitt science-fitction ævintýr, har nýggjastu stjørnurnar í Hollywood verða samanflættaðar við ein telduskaptan heim. Judy Law hevur leiklutin sum Sky Captain, og Gwyneth Patrov er Plly.

Tá alt sær svarast út, fáa tey hjálp frá fyrrverandi flammuni hjá Sky, og so er klárt til tann heilt stóra dystin millum tað góða og tað ónda.





**Frumsýning – Billettprísur 55,- kr.**
Fríggjadagin 12.11. kl. $16^{15}$ Fríggjadagin 12.11. kl. $18^{45}$
Leygardagin 13.11. kl. $16^{15}$ Leygardagin 13.11. kl. $18^{45}$
Sunnudagin 14.11. kl. $16^{00}$ Sunnudagin 14.11. kl. $18^{30}$

**Stórt úrval av DVD-filmum til sølu**

**HAVNAR BIO**
P Tlf. 31 19 56 P
www.bio.fo




**Frumsýning**
Fríggjadagin 12.11. kl. $21^{15}$ Fríggjadagin 12.11. kl. $23^{00}$
Leygardagin 13.11. kl. $21^{15}$ Leygardagin 13.11. kl. $23^{30}$
Sunnudagin 14.11. kl. $21^{00}$ Sunnudagin 14.11. kl. $23^{15}$




**Undanfrumsýning**
Fríggjadagin 12.11. kl. $23^{30}$




Fríggjadagin 12.11. kl. $20^{00}$ Leygardagin 13.11. kl. $23^{00}$
Sunnudagin 14.11. kl. $22^{15}$




Fríggjadagin 12.11. kl. $17^{15}$ Leygardagin 13.11. kl. $20^{00}$
Sunnudagin 14.11. kl. $19^{30}$